# Gerið skjótt av

**Leiðarin hjá NCC í Føroyum mælir Sandoyarfólki til at arbeiða skjótt, um tey ætla sær undisjóvartunnil undir Skopunarfirði í næstu framtíð**



*Svein Kristiansen frá NCC í Føroyum greiddi frá eini ætlanum fast samband undir Skopunarfirði*
*Mynd Óskar Óskarsson*

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Edvard Joensen*

Undirsjóvatunnil millum Streymoy og Sandoy er komin á breddan. Fundur hevur verið á Sandi um málið, og NCC mælir til at arbeiða skjótt.

Skulu Sandoyarfólk gera sær vónir um fast samband undir Skopunarfirði í næstu framtíð, er at fara í gongd við forarbeiðinum nú beinanveg, sigur Svein Kristiansen, leiðari hjá NCC í Føroyum.

Hann roknar við, at tað tekur eini trý ár ella so at fáa allar fyrireikingarnar upp á pláss. Og eftir sum hann eftir øllum at døma roknar við, at NCC fer at sleppa at gera hendan komandi tunnilin eisini, mælti hann Sandoyarfólki til at gera skjótt av, so klárt kann vera at byrja undir Skopunarfirði, tá Norðoyatunnilin er liðugur, fyri á tann hátt at spara tíð og kostnað.



*Fitt av fólki var komið í Virkið hetta kvøldið at hoyra um fasta sambandið við meginøkið*
*Mynd: Óskar Óskarsson*

Undan løgtingsvalinum var almennur fundur í Virkinum á Sandi, har málið um undisjóvartunnil undir Skopunarfirði var til umrøðu.

Sum skilst av Sandi, hevur NCC eina fyribilsætlan liggjandi fyri tunli undir Skopunarfirði.

Hesin tunnilin fer væntandi at verða einar níggju kilometrar langur, og hann fer at kosta út móti eini hálvari milliard, metir NCC.

Svein Kristiansen segði fyri Sandoyarfólki hendan dagin, at teir rokna við at gera tunnilin í pettum. Einir 26 metrar verða sprongdir í senn, og so verður gjørt liðugt. Ikki sum gjørt varð í Vágatunlinum, at fyrst varð skotið heilt ígjøgnum og síðan gjørt liðugt. Arbeitt fer at verða báðumegin frá samstundis, sigur NCC leiðarin.

Tá tosað verður um ein kostnað upp á einar 50 til 55 millónir fyri kilometurin, verður roknað við einum vanligum tveysporaðum vegi.

Verður hinvegin farið yvir til tríggjar vegbreytir, skulu eini 15 prosent leggjast aftur at kostnaðinum, sum givin er upp, kom fram á fundinum á Sandi.

Mesta dýpi, har tunnilin er ætlaður at liggja, er um 80 metrar, og farið verður einar 140 metrar niður við tunlinum, varð greitt frá.

Kortini verður tunnilin ikki so brattur, sum eitt nú Vágatunnilin er, sigur NCC.

Borað verður frá svinginum við Gomlu Rætt og suður móti Kirkjubø í fyrsta umfari. Umleið ein kilometur verður borað uppi á landi, áðrenn farið verður undir sjógv. Hetta fyri at minka hallið so nógv sum gjørligt.

Fast samband út í Hest var eisini umrøtt á hesum fundinum á Sandi. Bæði tunnil allan veg út í oynna, og ein teymur, sum endar einastaðni undir bygdini, har so ein lyfta verður upp í bygdina.

Greitt varð frá, at um tunnil skal gerast á vanliga hátt út í Hest, fer hann at kosta einar 200 milliónir aftur at tí, Sandoyartunnilin annars er mettur at kosta.

Verður hinvegin ein loysn við persónslyftu vald, kostar hon einar sjey til tíggju milliónir, varð sagt. Hendan loysnin merkir, at koyrandi verður til eitt parkeringspláss undir bygdini í Hesti. Har verða bilarnir settir, og fólk fara so við lyftu upp í sjálva bygdina.

# Stígið á gólv so lættliga

**Árliga afturvendandi dansináttin í Bygdarhúsinum í Hósvík verður komandi sunnunátt.Tá hittast fólk úr øllum landinum við áhuga fyri føroyskum dansi**

FØROYSKUR DANSUR
*Edvard Joensen*



*Aftur í ár skipar Bygdarfelagið Varðin fyri árligu dansináttini í Hósvík*

Árliga dansináttin í Hósvík byrjar leygarkvøldið klokkan 22.00. Dansað verður til út móti morgni.

Væl umtóktu dansinæturnar hjá Bygdarfelagnum Varðanum í Hósvík halda fram. Hetta er níggjunda árið á rað, at skipað verður fyri hesum tiltakinum, har fólk úr øllum landinum hittast at dansa føroyskan dans.

Byrjað verður, sum vanligt er, klokkan tíggju leygarkvøld, og dansað plagar so at verða til umleið klokkan fýra sunnumorgun.

Tað er eftir gomlum siði, at tann, sum hug hevur, styrki og hegni til at taka yvir, skipar ta vísu ella kvæði, hann hevur hug at byrja. Eingin føst skrá er løgd fyri slíkar dansinætur.

Siður er vorðin, tá fólk hittast til slíkar dansinætur, at tá liðið er nakað út um midnátt, fær dansifólkið ein breyðbita og okkurt drekkandi afturvið. Hetta er íroknað atgongumerkið, sum kostar 50,- krónur.

Hósvíkingar vóna, at dansináttin eisini hesaferð verður væl vitjað, eins og tær vanliga plaga at vera.



# Kapprenningin er farin í gongd

**Nú Lisbeth L. Petersen tók avleiðingarnar av tí vánaliga valinum hjá Sambandsflokkinum, hómast fleiri kandidatar til formanspostin**

FORMANSVAL
*Stefan í Skorini*

Gitingarnar um formanspostin hjá Sambandsflokkinum eru farnar í gongd. Spurningurin er, hvør skal taka við eftir Lisbeth L. Petersen, sum ikki bleiv serliga drúgv í hesum sessinum.

Hóast flokkurin við Lisbeth á odda hevur fingið flest atkvøður í tveimum teimum seinastu løgtingsvalunum og til seinasta fólkatingsval, tók hon mikudagin avleiðingarnar av tí vánaliga løgtingsvalinum og segði seg frá alt fyri eitt.

Tann 26. og 27. mars fer Sambandsflokkurin at hava landsfund í Lærarskúlanum í Havn. Tá skulu limir floksins velja nýggjan formann eftir Lisbeth L. Petersen, sum dagin eftir valið tók seg aftur sum leiðari í Sambandsfloksins.



*Kapprenningin um at gerast høvdingi Sambandsfloksins eftir Lisbeth L. Petersen er farin í gongd. Alfred Olsen er virkandi formaður inntil landsfundin, men Edmund Joensen spøkir eisini handan leiktjaldið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Starvsnevndin í flokkinum skal hava skrivlig boð um valevni til formanspostin í minsta lagi fimm dagar undan fundinum, og hvørt valevni skal hava tveir stillarar, upplýsir Helgi Abrahamsen, skrivari í Sambandsflokkinum.

### Alfred og Edmund

Lisbeth L. Petersen tók við formanspostinum í mars mánaði í 2001, eftir at hon vann eitt kampval ímóti Edmundi Joensen. Tá gjørdist Alfred Olsen samstundis nýggjur næstformaður.

Tað liggur nær at hugsa sær, at Alfred Olsen nú tekur eitt fet uppeftir stiganum og verður nýggjur formaður. Hann er virkandi formaður í løtuni. Hetta skal tó ikki takast fyri givið.

Fyrrverandi formaðurin Edmund Joensen, løgmaður frá 1994 til 1998 og sum hevur verið tingformaður seinasta valskeið, skal als ikki avskrivast ov skjótt. Fleiri eygleiðarar halda, at Edmund Joensen er eitt sera gott boð uppá formanspostin, og hann hevur jú royndir sum formaður og var tingformaður seinasta valskeið.

Tá ónøgd var við Edmund Joensen eftir seinasta val, skeyt Unga Sambandið Lisbeth L. Petersen upp sum formansevni, og hon fekk stuðul á landsfundinum.

Kaj Leo Johannesen er møguliga ein outsidari sum formansevni, men hann er kortini nakað ungur til formanspostin, hóast hann verður mettur sum ein framtíðarmaður í flokkinum.

Eingin inni í Sambandsflokkinum fæst at siga nakað ítøkiligt um komandi formansvalið. Hetta skal eisini takast sum taktiskt spæl frá komandi valevnum til formansvalið. Tey vilja óivað ikki avdúka beinanvegin, hvør ætlar sær at stilla upp.

### Lisbeth tók ábyrgdina

– Eg mátti ikki taka meg aftur, men hetta var mítt egna val, sigur Lisbeth L. Petersen, fyrrverandi formaður Sambandsfloksins. Hon leggur áherðslu á, at hon ikki varð noydd at taka seg aftur.

– Tá tað gongur illa, hevur formaðurin høvuðsábyrgdina, og tí mátti eg taka avleiðingar av hesum valinum, sigur Lisbeth L. Petersen, sum er sera kedd av tí samlaða úrslitinum hjá flokkinum.

Hon sigur, at hon hevur umhugsað at taka seg aftur sum formaður fleiri ferðir seinastu tíðina, og eftir hetta valúrslitið var tað natúrligt, at Lisbeth fór frá.

Tá Lisbeth gjørdist formaður í 2001, gjørdi hon greitt, at hon vildi hava Alfred Olsen sum næstformann. Tað er tí ikki óhugsandi, at hon fer at stuðla honum í einum komandi formansvali.

– Eg havi ongantíð havt teir spískastu albogarnar, og eg varð fleiri ferðir biðin um at stilla upp, áðrenn eg endiliga gjørdi tað, sigur Lisbeth L. Petersen.

– Gáttin fyri konufólk hevur altíð verið hægri enn fyri menn í politikki. Tí var eg rættiliga tilkomin, áðrenn eg kom uppí politikk í løgtinginum, sigur fyrrverandi formaðurin.

Um hesi trý árini sum formaður sigur Lisbeth, at tað hevur verið rættiliga spennandi, men samstundis strævið og slítandi.

# Sessurin hjá Poul ridlar

**Tað verður helst Heðin Zachariasen úr Streymnesi, ið tekur sæti á tingi sum eykavaldur fyri Fólkaflokkin ístaðinfyri Poul Michelsen**



*Sessurin hjá Poul Michelsen á tingi er í vanda. Tað verður helst Heðin Zachariasen úr sama flokki, ið tekur hansara pláss*
*Savnsmynd*

VAL
*Stefan í Skorini*

Tingsessurin hjá Poul Michelsen er ótryggur í løtuni. Líkt er til, at hann verður noyddur at víkja fyri Heðini Zachariasen um tann síðsta eykavalda tingsessin.

Tá Sosialurin hevði Hilmar Høgenni á Løgmálaráðnum í telefonini á middegi hósdagin, var eingin avgerð tikin, hvørt tað bleiv Poul Michelsen ella Heðin Zachariassen. Hendan avgerð skuldi takast hósdagin eftir middag.

Samfelagsfrøðingurin Jóannes Hansen skrivar í Tinghelluni í Sosialinum í dag, at tað verður Heðin Zachariasen og ikki Poul Michelsen, ið tekur sæti á tingi.

Valkvøldið var annars sligið fast, at tað var Poul Michelsen, sum gjørdist tað síðsta eykavalda umboðið hjá Fólkaflokkinum, men síðani er ivi sáddur um hansara sess í tinginum.

Orsøkin er, at øll ikki eru á einum máli um, at hvussu vallógin skal tulkast, og hvussu teir eykavaldu skulu roknast út.

– Tað er ongantíð áður komið fyri, at ein flokkur fær tvey eykavald umboð úr tí sama valdøminum, sigur Hilmar Høgenni úr Løgmálaráðnum, har fulltrúðarnir skuldu gera ein úrskurð í málinum.

### Heðin ella Poul

– Soleiðis eru spælireglarnir. Eg verði ikki vónbrotin, um eg kortini ikki sleppi á ting, sigur Poul Michelsen, nú tað er ivasamt, um hann sleppur at taka sæti á tingi.

Hann er sera fegin um, at sjálvstýrisrørslan fekk eitt so gott val hesuferð, tí tað var orsøkin til, at hann stillaði uppaftur.

– Einasta orsøkin til at eg stillaði uppaftur í 2002 var fullveldismálið, og eg vildi arbeiða fyri at gera Føroyar til eitt sjálvstøðugt ríki, sigur Poul Michelsen. Um tann fyrrverandi borgarstjórin í Havn fellur á hesum valinum, hevur Fólkaflokkurin mist ein av sínum størstu fullveldis- og vinnulívsprofilum.

Poul Michelsen sat á tingi frá 1984 til 1990, men eftir tólv ár uttanfyri landspolitikk valdi hann at stilla uppaftur.

Hann hevur verið sera sjónligur í valstríðnum og hevur nýtt heilt fitt av peningi til hetta.

– Ja eg havi í øllum førum nýtt nóg mikið av peningi í hesum valstríðnum. Vit eru nakrir, ið ikki eru so nógv frammi til dagligt og mugu tí spíla okkum út, tá val er í hondum, sigur Poul Michelsen.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Heðini Zachariasen, áðrenn blaðið fór til prentingar.